# Føroyskt vitaverk

**Yvirtøka av málsøkjunum vitaverk og uppmerking, tilbúgving og ávísum sjóvinnumálum verða nú fyrireikað**

YVIRTØKUR
*Heri á Rógvi*

Landsstýrismaðurin í fiski- og sjóvinnumálum, Jørgen Niclasen, er farin undir at fyrireika eina røð av yvirtøkum. Talan er um vitaverkið og uppmerking, útbúgving og ávísum sjóvinnumálum.

— Við hesum byrja fyrireikingarnar av nøkrum málsøkjum, sum landsstýrismaðurin varðar av samsvarandi ætlanini hjá samgonguni, og soleiðis sum semja er um og sagt í felags fráboðanini frá løgmanni og forsætismálaráðharranum hin 14. januar 2002, har sagt verður, at semja er millum partarnar um at byrja fyrireikingarnar um yvirtøku av teimum málum, ið ikki standa á lista A ella B í heimastýrislógini, skrivari Fiskimálaráðið í tíðindaskrivi.

Sum er verður vitaverkið umsitið av Farvandsvæsenet, ið er stovnur undir danska Verjumálaráðnum. Ein av trupulleikunum við at yvirtaka vitaverkið hevur verið, hvat ráð skuldi málsøkið fella innanfyri. Talan er um danskt verjumál, og avgerð er nú tikin um, at hetta hóskar seg best inn undir sjóvinnumál í Føroyum.

Í Føroyum arbeiða sjey fólk fyri Farvandsvæsenet, og liggur kostnaðurin einastaðni omanfyri tríggjar milliónir um árið. Eisini eru lokalir vitapassarar ymsastaðni í Føroyum, sum eisini síggja til, at teir 27 vitanir í Føroyum virka sum teir skulu. Dagligi raksturin í Føroyum verður fyriskipaður av loranstøðini á Eiði, ið Farvandsvæsenet eisini rekur.

Tá Sosialurin síðsta summar seinast skrivaði um vitaverkið, søgdu tvey av starvsfólkunum, at teir einki ringt kundu bera danska myndugleikanum á økinum.

— Alt neyðugt arbeiði verður gjørt, og vit vita altíð, at peningur er settur av til tær uppgávur, ið skulu gerast, varð sagt tá.

Umframt vitatænastuna hevur Farvandsvæsenet ábyrgd av at merkja siglingarleiðir, vitalistanum og kunngerðum í Efterretninger for søfarende av broytingum av avmerkingum v.m. Farvandsvæsenet hevur somuleiðis ábyrgd av sjókortum yvir føroyskar sjóleiðir, ið verða gjørd av Kort- og Matrikelstyrelsen.

### Tilbúgving

Málsøkið tilbúgving verður í dag lutvíst umsitið av føroyskum myndugleikum og partar av tilbúgvingarøkinum eru yvirtikin føroysk sermál — herundir m.a. sjótilbúgvingin og brunatilbúgvingin. Yvirtøkan fevnir um øll tey tilbúgvingarmál, ið enn ikki eru staðfest sum yvirtikin føroysk sermál soleiðis, at føroyskir myndugleikar fáa myndugleikan til at skipa alt tilbúgvingarøkið.

Á sjóvinnuøkinum eru flestøll málsøkir longu yvirtikin føroysk sermál og fevna yvirtøkurnar sostatt um øll tey sjóvinnumál, ið enn ikki eru staðfest sum yvirtikin føroysk sermál — herundir m.a. yvirtøku av sjólógini og loðslógini.

Vit vildu fegin havt eina viðmerking frá Jørgen Niclasen, landsstýrismanni, um víðari ætlanirnar við yvirtøkuni, men hann var staddur uttanlands, tá vit royndu at fáa hendur á honum.



*Hesin vitin, vitin í Mykinesi, er frá 1908. Í sínari tíð búði ein heil familja úti í hólminum fyri at ansa vitanum. Nú er hann vorðin automatiseraður. Næsta broytingin verður, at vitapassingin verður føroyskt málsøki*

*Mynd: Bárður Eklund Johansen*

# Smyril liggur tungt í sjónum

**Longu áðrenn nýggja suðuroyarskipið er bygt, er tað greitt, at suðuroyarleiðin við skipinum liggur tungt í sjónum. Sum er vanta tretivu milliónir í til eina nýggja atløgu bryggja. Alternativið er, at nýggi Smyril leggur at har og tá tað er pláss fyri honum í Havn**

SMYRIL
*Heri á Rógvi*

— Vinnumálaráðið er í einari truplari støðu.

Hesi orðini eigur landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm. Spírin til truplu støðuna er nýggja suðuroyarskipið.

Fyri uttan at vera kostnaðarmiklasta verkætlanin av sínum slag nakrantíð at smíða skipið, so skulu havnirnar í Suðuroynni og í Havn eisini riggast til, soleiðis at nýggja skipið skal kunna leggja at á bestan hátt.

Jan Christiansen hevur fyri Sosialinum áður gjørt vart við, at Tórshavnar kommuna ikki er sinnað til at gjalda kostnaðin fyri eina nýggja atløgubryggju til komandi suðuroyarskipið.

Hetta hevur Bjarni á Djurholm eisini sannað á fundum við Tórshavnar havn og borgarstjóran.

— Sum landsstýrismaður skal eg tryggja optimal viðurskifti fyri nýggja suðuroyarskipið, sigur Bjarni Djurholm.

Sum landsstýrismaðurin málber seg, so liggur hetta arbeiðið tungt í sjónum í løtuni.

Arbeiðið at gera eina nýggja atløgubryggju á eystarubryggju í Havn er met at kosta einar 30 milliónir. Harumframt skal eitt arbeiðið gerast fyri 55 mió. á Tvøroyri til nýggja suðuroyarskipið. 25 milliónir eru játtaðar í 2003 og 30 milliónir mugu so játtast í 2004. Harumframt skal landið av við í øllum førum 18,5 mió. til útbyggjan av havnini í Vági.

Nýggja Suðuroyarskipið skal handast eigaranum 12. oktober 2004 og verður sett í sigling nakað eftir.

— Eingir pengar eru játtaðir til atløgubryggju í Havn, tí tað eru ongir pengar. Sum er gongur illa við at fáa alt at ganga upp, sigur Bjarni Djurholm.

Í fyrstu atløgu varð tosað um, at landið skuldi rindað ein triðing av móttøkutorninum á Eystaru bryggju. Hesin kostnaðurin skuldi ikki gerast størri enn seks milliónir.

— Hetta legði fyri landsstýrið, men vilji var ikki til at játta hesar pengarnar, og vit eru nú farin um evstamark, og eg havi boðað Tórshavnar kommunu frá, at vit hava ikki pengar tøkar til tornið, sigur Bjarni Djurholm.

Eftir hvat landsstýrismaðurin skilur, verður tornið bert bygt í samstarvi við Smyril Line og ikki við nýggja suðuroyarskipinum sum endamálið.

Landsstýrismaðurin arbeiðir nú eisini við møguligum loysnum, sum innibera, at Tórshavnar kommuna skal gjalda ein mundandi part av arbeiðinum, og endurgoldið verður so kommuni í form av endurgjaldi ella havnagjaldi. Hetta er tó ikki komið longur á borðið hjá landsstýrismaðurin.

Tórshavnar kommuna hevur ongar pengar sett av til at gera atløgubryggju til nýggju Norrønu, men nýggja Norrøna verður uppfatað sum ein vanligur góður kundi, og harvið verður ein nýggja atløgubryggja og torn gjørd.

### Liggja har tað er pláss

Tekningarnar, sum hava staðið í Sosialinum, eru annars gjørdar í sambandi við nýggju atløgubryggjuna hjá nýggja suðuroyarskipinum. Hetta gevur skipinum eitt fæst og gott pláss tætt við verandi atløgustað.

Eru eingir pengar til arbeiðið, so má skipið húsast aðrastaðni.

Tórshavnar býráð hevur greitt meldað út, at nýggja suðuroyarskipið vil fáa rúmd har og tá tað er pláss fyri tí. Tað merkir, at nýggja suðuroyarskipið kann leggja at við molan ella við havnakontórið ella kanska má bíða eftir plássi.

Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at Smyril sum er má leggja at við havnakontórið. Hetta er als ikki hóskandi, tí bilar og ferðafólk mugu ganga út við bakportri, og ferðslan verður nógd darvað, og fløskuhálsar stinga seg upp.

Sum tað er sær út nú, so verður tað tó við sama stað, at Smyril skal leggja at kanska í eini tvey ár afturat, tí rúm er ikki skapt fyri honum nakra aðrastaðni.



*Á hesum stað við eystara bryggju, har Norrøna liggur á myndini, skal Smyril leggja at næstu árini, sum støðan er nú. Seinni kann hetta gerast atløgustað í besta føri.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Kall almannakunnger

Í dag – hósdagin – almannakunnger Kall teirra ætlanir og konsept á GSM-økinum.

Kall tekur nú kappingina upp við Føroya Tele um teir nógvu GSM-kundarnar, og í tí sambandi verður skipað fyri móttøku í Listaskálanum seinnapartin hósdagin.

Longu nú er talið av GSM-kundum munandi størri enn talið av fastnet kundum. GSM hevur eisini verið ein lønandi íløga hjá Føroya Tele, sum kann geva GSM stóran part av heiðurinum fyri metgóðu úrslitini seinastu árini.

Spurningurin er so, hvussu kappingin fer at ávirka gongdina.



# Í meðal 337 bilar við Strandferðsluni um dagin

**Tøl hjá Strandferðsluni vísa, at higartil í ár hevur Strandferðslan í meðal flutt 337 bilar hvønn vegin um Vestmannasund. – Tað kann tykjast løgið, at leiðslan fyri P/F Vágatunnilin ikki so mikið sum hevur biðið um tølini hjá okkum, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni**

BUMMGJALDIÐ
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Í meðal fara 350 bilar at koyra aftur og fram undir Vestmannasund um samdøgrið. Hetta er metingin hjá leiðsluni fyri P/F Vágatunnilin, ið sostætt hevur nýtt 350 bilar sum ein grundleggjandi faktor í útrokningunum, tá prísurin er ásettur. Síðan talið 350 fyrstu ferð varð havt á munni, hevur verið dúgliga kjakast um, hvørt talið er á eini leið ella heilt við síðuna av. Eisini hevur verið spurt, hvørjar metingar leiðslan í P/F Vágatunnilin byggir sína meting á.

Í øllum kjakinum og øllum metingum, ið eru gjørdar frammanundan, undrast stjórin á Strandferðsluni, Reidar Nónfjall á, hví Strandferðslan, sum í dag hevur til uppgávu at flyta bilar um Vestmannasund, ongantíð er biðin um nøkur fesk tøl, ið kanska kunnu siga eitt sindur um støðuna.

- Eg má siga, at tað undrar meg ikki sørt, at leiðslan fyri P/F Vágatunnilin als ikki hevur spurt okkum eftir nøkrum tølum fyri ferðsluna um sundið, sigur Reidar Nónfjall, ið metur atburðin hjá P/F Vágatunnlinum mest minna um stórlæti, arrogansu.

### 337 bilar um dagin

Strandferðslan førir neyv tøl yvir, hvussu nógvar bilar og hvussu nógv ferðafólk, ið skipini hjá stovninum flyta millum oyggjarnar. Tølini verða skrásett fyri hvønn einstakan túr, bæði í samband við innkrevjingina, og av tí at trygdarkrøvini áseta hetta. Uppgerðin yvir ferðsluna um Vestmannasund vísir, at higartil í ár hevur Ternan flutt yvir 98.000 bilar um sundið, aftur og fram. Í meðal gevur hetta 337 bilar um dagin. Her má havast í huga, at frá 18.apríl til 15.maj var verkfall, og tá sigldu skipini hjá Strandferðsluni ikki. Lakasti mánaðurin var februar, tá Strandferðslan flutti í meðal 248 bilar aftur og fram um Vestmannasund um dagin. Mesta ferðslan var í juli, tá Starndferðslan flutti 435 bilar aftur og fram um sundið um dagin. Tølini fevna sjálvsagt bara um bilarnar, ið pláss var fyri umborð á Ternuni, og ikki teir bilar, ið stóðu eftir á bryggjuni.

Hvat ferðafólkatalið viðvíkur vísa uppgerðir hjá Strandferðsluni, at higartil í ár hevur stovnurin flutt 318.000 ferðafólk um Vestmannasund.



*Ein uppgerð hjá Strandferðsluni vísir, at higartil í ár hevur stovnurin í meðal flutt 337 bilar aftur og fram um Vestmannasund um dagin. – Tað kann tykjast løgið, at P/F Vágatunnilin ikki so mikið sum hevur spurt eftir okkara tølum, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni*

## Úrslitaleysur fundur við P/F Vágatunnilin

**Jóanis Nielsen, tingmaður fyri Fólkaflokkin í Vágum, fekk einki burturúr fundinum, ið flokkur hansara hevði við leiðsluna í P/F Vágatunnilin týsdagin. Samgongutingmaðurin í Vágunum hevur nú biðið um fund við løgmann**

BUMMGJALDIÐ
*Jón Brian Hvidtfeldt*



*- Koma vit ikki víðari við málinum í samgonguni, so liggur eitt uppskot frá mær sjálvum og Marjus Dam klárt at leggja fyri løgtingið, sigur Jóanis Nielsen, ið hevur biðið um fund við løgmann.*

Fólkaflokkurin, og serliga vágatingmaðurin hjá flokkinum, Jóanis Nielsen, fekk einki burturúr fundinum við leiðsluna fyri P/F Vágatunnilin. Jóanis Nielsen hevði annars undan fundinum vónir um, at fundurin fór at geva ábendingar um, hvussu tað ber til at broyta prísin fyri at koyra undir Vestmannasund, tá fasta sambandið verður tikið í nýtslu 10. desember.

Men nú Jóanis Nielsen, saman við restina av Fólkaflokkinum, hevur verið á fundi við P/F Vágatunnilin, kann hann bara staðfesta, at leiðslan í partafelagnum stendur við sítt.

- Eg haldi, at leiðslan fyri P/F Vágatunnilin á fundinum fekk greitt at vita, hvar vit halda um prísin. Men leiðslan vardi sína avgerð, og tí meti eg ikki, at vit í dag eru komin nærri eini loysn, so prísurin kann broytast, staðfestir Jóanis Nielsen.

Sjálvur heldur Fólkaflokstingmaðurin úr Vágum, at allir flokkar áttu at biðið um fund við leiðsluna fyri P/F Vágatunnilin fyri á tann hátt at royna at ávirka leiðsluna at endurskoða sína avgerð um ásetan av prísi.

### Biðið um fund við løgmann

Jóanis Nielsen sigur, at hann nú hevur biðið um fund við Anfinn Kallsberg, løgmann, fyri at finna út av, hvussu til ber at koma víðari við málinum.

- Endamálið við at tosa við løgmann er at fáa málið umrøtt í samgonguni, so vit saman finna eina loysn á, hvussu til ber at broyta prísin fyri at koyra undir Vestmannasund. Koma vit ikki víðari við málinum í samgonguni, so liggur eitt uppskot frá mær sjálvum og Marjus Dam klárt at leggja fyri løgtingið, sigur Jóanis Nielsen. Uppskotið frá vágatingmonnunum snýr seg í stuttum um at flyta raksturin av tunnlinum úr P/F Vágatunnilin yvir í landskassan, fyri tann hátt at minka um útreiðslurnar hjá partafelagnum.

Jóanis Nielsen sigur, at málið hevur skund, tí ein loysn skal finnast, áðrenn tunnilin letur upp, tann 10.desember.

# Skal inn at sita í 10 mánaðir

**Talan var ikki um drápsroynd, tá ein 25 ára gamal maður fyri góðum tveimum mánaðum síðan skeyt eftir politinum í Magnus Heinasonargøtu í Havn. Tað var niðurstøðan hjá Føroya Rætti, sum í staðin dømdi mannin fyri at hava sett lív og heilsu í vanda hjá politistunum**

RÆTTARMÁL
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Tað ber ikki til at staðfesta, at ætlanin hjá tí 25 ára gamla manninum var at drepa politistarnar, og tí ber heldur ikki til at døma hann fyri drápsroynd. Tað var niðurstøðan hjá Føroya Rætti, eftir at málið seinnapartin týsdagin varð tikið upp til dóms.

Ákærin metti hendingina í Magnus Heinasonargøtu í Havn um morgunin hin 11.september at vera so álvarsliga, at maðurin varð skuldsettur fyri drápsroynd móti politistunum.

Í rættinum vísti ákærin millum annað á, at var ætlanin hjá manninum bara at skjóta fyri at ræða politistarnar, so kundi hann havt skotið aðrastaðni, t.d. upp í loft. Frástøðan millum mannin og politistarnar var 21 metrar, og skotið brast í bakrútin og stólpan á politibilinum, sum annar av politistunum goymdi seg aftanfyri. Ákærin førdi fram, at 25 ára gamli maðurin átti at hava dugað sæð, at tað var ein ávísur vandi fyri, at skotið fór at raka politistarnar.

Í síni skuldseting førdi ákærin fram, at um dómarin ikki metti, at 25 ára gamli maðurin ætlaði at drepa politistarnar, so mátti hann í hvussu so er dømast fyri at hava sett lív og heilsu hjá politistunum í vanda.

Verjin metti, at talan als ikki kundi vera um drápsroynd. Hann vísti á, at tað skal kunna prógvast, at maðurin veruliga ætlaði at drepa politistarnar, og at tað var einki sum bendi á, at so var.

Í síni niðurstøðu segði Føroya Rættur, at hann metti ikki, at tann 25 ára gamli maðurin hevði í hyggju at drepa politistarnar, ið stóðu ávíkavist aftanfyri ein bil og eitt húsahorn. Men av tí at maðurin hevði skotið við høglbyrsuni móti politistunum, so metti dómarin, at talan var um eina »særlig hensynsløs handling«, ið kundi seta lív og heilsu hjá politistunum í vanda.

Føroyar Rættur valdi tí at døma mannin 10 mánaða treytaleysa fongsulsrevsing. Harumframt skal hann gjalda góðar 15.000 krónur í endurgjaldi fyri skaðan, skotið frá høglbyrsuni gjørdi á politibilin, umframt at politiið legði hald á tvær byrsur hjá manninum.

25 ára gamli maðurin hevur sitið í varðhaldinum síðan hann var handtikin 11.september, og henda tíðin verður drigin frá teimum 10 mánaðunum, ið dómurin ljóðaði uppá. Hóast maðurin og verji hansara bóðu um umhugsingartíð til at kæra dómin, so verður maðurin fyribils sitandi í varðhaldinum. Hetta góðtók hann í rættinum týsdagin.

### Ákærin rímuliga nøgd

Hóast ákærin, Dorthe Møller Andersen, upprunaliga metti grundarlag vera fyri at skuldseta mannin fyri drápsroynd, so hevði hon kortini tikið fyrivarni og í øðrum lagi skuldsett mannin fyri at seta lív og helsu hjá politistunum í vanda. Eftir dómin segði ákærin, at tá rætturin nú ikki metti, at talan var um drápsroynd, so var hon rímiliga væl nøgd við dómin. Hon vildi tó mælt til, at maðurin átti at havt fingið umleið eitt ára treytaleysa fongsulsrevsing.

Verjin, Jógvan Páll Lassen, segði eftir dómin, at eftir hansara tykki var tað mest umráðandi, at maðurin ikki varð dømdur fyri drápsroynd, og hann fegnaðist um, at dómarin var av somu áskoðan. Hann metti tó, at 10 mánaða fongsul var í meira lagi. Verjin og tann 25 ára gamli maðurin hava nú 14 dagar at umhugsa, hvørt teir skulu kæra dómin fyri hægri rætt.